Frá
Havnar Arbeiðskvinnufelag

Skrivstovan er stongd frá 23.–6. januar

Vit ynskja limum okkara við húski og viðskiftafólki eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár við tøkk fyri tað farna.

Nevndin

Jóla-TILBOÐ

Magnolia stellið...!




DØMI:

Te-koppur 215,-

Tallerkur 164,-

Idéelle gløs



Reyðvín 164,-



Punsjbolli 269,- BODUM

P/F VALDEMAR LÜTZEN

Vágsbotn · 100 Tórshavn · Tlf. 1 1675

Viðvíkjandi kreditti hjá løntakarum til landskassan:

Reallønin veksur

Sunnukvøldið 15. des. lovaði eg í UF at kanna pástandin hjá Jóannesi Eidesgaard, endurtikin av útvarpi og sjónvarpi og útgreinaður í Sosialinum, at komandi bruttoskattaskipan fór at tyngja búskapin hjá vikuløntum løntakarum, tí viðkomandi fór at veita landskassanum kreditt í upp í triggjar vikur, til rentuískoytið kom inn á lønarkonti hjá viðkomandi.

Búskapardeildin í Tinganesi saman við Sparikassanum hevur síðan kannað haldið í hesum pástandi.

Úrslitið av kanningini vísir, at løntakarin hevur samanlagt uml. 7 oyru um mánaðin, svarandi til 84 oyru í alt **árliga** í meirútreiðslu av nýggju bruttoskattaskipanini. (Sjá viðløgdu útrokning).

Hin vegin veitir bruttoskattaskipanin við innbygda skattalættanum einum løntakara við arbeiðsmannaløn uml. kr. 1.60 **um tíman.** Hetta er ein **netto** lønarvøkstur, sum svarar til eina øking í lønini up á uml. 3.00 um tíman.

Henda reallønarhækkan hvønn tíma er stór ábót sammett við tey fáu oyru, løntakarin skal av við árliga.

Anfinn Kallsberg,
landsstýrismaður

Dømi um tímaløntan arbeiðara við gomlu og nýggju skipanini.

Fyritreytir:

Løn= 3000,- pr. viku
Løn= 300.000,- kr. Renta 7,5% pr. ársins evt 30 kr.
Rentuumrokning= 30.224,- pr. kr.
Kommunuskattur = 20 %

Gomul skipan		Nýggj skipan	
Vika 1			
Løn	3.000,- kr.	Løn	3000,- kr.
Skatt	642,- kr.	Skatt	1.105,- kr.
AM-gjald	97,- kr.	AM-gjald	97,- kr.
Disponibel inntøka	2.261,- kr.	Disponibel inntøka	1.798,- kr.
Inngoldið á føggjarkontu	1.097,- kr.	Inngoldið á føggjarkontu	633,- kr.
Til nýtslu	1.364,- kr.	Til nýtslu	1.165,- kr.
Renta av føggjarkontu	0,15%	Renta av føggjarkontu	0,15%
Rentuinntøka í 21 dagur	0,03 kr.	Rentuinntøka í 21 dagur	0,04 kr.
Vika 2			
Løn	3.000,- kr.	Løn	3000,- kr.
Skatt	642,- kr.	Skatt	1.105,- kr.
AM-gjald	97,- kr.	AM-gjald	97,- kr.
Disponibel inntøka	2.261,- kr.	Disponibel inntøka	1.798,- kr.
Inngoldið á føggjarkontu	1.097,- kr.	Inngoldið á føggjarkontu	633,- kr.
Til nýtslu	1.364,- kr.	Til nýtslu	1.165,- kr.
Renta av føggjarkontu	0,15%	Renta av føggjarkontu	0,15%
Rentuinntøka í 14 dagar	0,06 kr.	Rentuinntøka í 14 dagar	0,04 kr.
Vika 3			
Løn	3.000,- kr.	Løn	3000,- kr.
Skatt	642,- kr.	Skatt	1.105,- kr.
AM-gjald	97,- kr.	AM-gjald	97,- kr.
Disponibel inntøka	2.261,- kr.	Disponibel inntøka	1.798,- kr.
Inngoldið á føggjarkontu	1.097,- kr.	Inngoldið á føggjarkontu	633,- kr.
Til nýtslu	1.364,- kr.	Til nýtslu	1.165,- kr.
Renta av føggjarkontu	0,15%	Renta av føggjarkontu	0,15%
Rentuinntøka í 7 dagar	0,03 kr.	Rentuinntøka í 7 dagar	0,02 kr.
Vika 4			
Løn	3.000,- kr.	Løn	3000,- kr.
Skatt	642,- kr.	Skatt	1.105,- kr.
AM-gjald	97,- kr.	AM-gjald	97,- kr.
Disponibel inntøka	2.261,- kr.	Disponibel inntøka	1.798,- kr.
Inngoldið á føggjarkontu	1.097,- kr.	Inngoldið á føggjarkontu	633,- kr.
Til nýtslu	1.364,- kr.	Til nýtslu	1.165,- kr.
Renta av føggjarkontu	0,15%	Renta av føggjarkontu	0,15%
Rentuinntøka í 0 dagar	0,00 kr.	Rentuinntøka í 0 dagar	0,00 kr.
Samlað inntøka eftir skatt	9.044,- kr.	Samlað inntøka eftir skatt	7.192,- kr.
Samlað rentuinntøka	0,19 kr.	Samlað rentuinntøka	0,12kr.
Samlað inngoldið á føggjarkontu	4.388,- kr.	Samlað inngoldið á føggjarkontu	2.532,- kr.
Rentuuttbúgv	0,- kr.	Rentuuttbúgv	1.854,- kr.
Til nýtslu um mánaðin	4.656,19kr.	Til nýtslu um mánaðin	4.660,12kr.

Uppá eitt ár fær ein við ti gomlu skipanini 2,28 kr í rentu við omanfyristandandi fortreytum.
Uppá eitt ár fær ein við ti nýggju skipanini 1,44 kr í rentu við omanfyristandandi fortreytum.
Tá hevur persónurin fingið ein lærta uppá uml. 4 kr.

Svar til Annfinn Kallsberg

Annfinn Kallsberg, landsstýrismaður hevur í dag sent út tíðindaskriv, har hann við hjálp frá búskapardeildini í Tinganesi og Norðoyar Sparikassa roynir at vísa aftur onkrar av mínum atfinningum av ætlaðu bruttoskattaskipanini.

Úrslitið av kanningini hjá landsstýrismanninum vísir, at løntakarin í dømínum samanlagt hevur uml. 7 oyru meira eftir um mánaðin.

Men viðlagda útrokningin vísir júst, at tann tímalønti fyri hvørja viku, sum gongur, til rentustuðulin verður úgoldin, fær 463 kr. færri í lønarskjáttuna um vikuna ella 1852 kr. um mánaðin eftir ætlaðu skipanini.

Undirstrikast má tað óhepna í, at útrokningin hjá landsstýrismanninum inniheldur eina fíggjarkonto, sum løntakarin hvørja viku skal gjalda inn á. Hetta órógvar útrokningina ikki so lítið, og er ein roynd at leiða mína atfinning inn á eitt annað spor.

Ósemjan snúði seg, hvussu stóran og hvussu langan kreditt tann tímalønti skuldi veita landskassanum eftir nýggju skipanini í mun til verandi skipan, har mótrokningin hendir beinanvegin.

Skulu vit seta tað týðiligari upp uttan at taka dagar ímillum, hvat løntakarin seinni brúkar sína disponiblu inntøku til, tí tað hevur avgjørt einki við skattalógina og við hesa argumentatión at gera, so fær tann tímalønti í dømínum 463 kr. færri í lønarposan hvørja viku, tá hesin hevur verið eftir síni løn í peningastovni ella á útgjaldsstovu. Tær fyrstu av hesum 463 kr. fær hann ikki endurgoldið fyrr enn góðar 3 vikur seinni, og tá hann fær endurgjaldið, hevur hann falt latið landskassanum 1852 kr. í kreditti.

Tórshavn 18. des. 1996.

Jóannes Eidesgaard

Gleðið vinir og kenningar úti sum heima við einari

GÓÐARI JÓLAGÁVU

Gevið teimum **SOSIALIN** 5 FERÐIR UM VIKUNA

ÓKEYPIS *TIL NÝGGJÁRS um BLAÐHALD verður teknað NÚ*

Sendið lepan ella ringið 11820

tíðindablaðið
SOSIALURIN
BOX 76 · 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið

64



Ja!

Undirritaði teknar sum haldara av SOSIALINUM – 5 ferðir um vikuna fyri

Jan. ársfj. '97 (Føroyar) fyri kr. 235,-

Navn:

Bústaður:

Postnr., bygd/býur:

Tlf.: Undirskrift:

☐ Haldarar í Danmark: 425,-/ársfj.
☐ Haldarar í Danmark: (5 bl. í senn): 340,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir

Rokning til

Navn:

Bústaður:

Postnr., bygd/býur:

Tlf.: Undirskrift:

Pizzaria
Tlf. 18866
TILBOÐ HESA VIKUNA
Hesa vikuna hava vit pizza nr. 5 v/ostí, tomatum, oksakjøti, leyki og oregano fyri
bert 55,-
Annars eru 16 ymisk slag at velja ímillum
Pizzaria
Tlf. 18866